KÍ flúgvandi byrjan upp á endaspælið

Í vikuskiftinum var sett hol á endaspælið í bestu føroysku kvinnudeildini. Í bólki A komu HB, VB og Skála víðari úr innleiðandi umfarinum, meðan KÍ, B36 og NSÍ komu víðari í bólki B. KÍ fekk eina flúgvandi byrjan uppá endaspælið móti einum skerdum HB liði, meðan tað gekk sum væntа í hinum báðum dystunum

Mynd: JH

KÍ fekk eina dreymabyrjan, tá tær á heimavølli hølvaðu eitt skert HB lið igjøgnum

HEINI Í SKORINI

Fríggjadagin var fyrsti dystur í endaumfarinum í bestu føroysku kvinnudeildini leiktur, og var hetta ein sera týdningarmikil dystur. Tað vóru risarnir í føroyskum kvinnufótbólti, og føroyskum fótbólti sum heild, KÍ og HB, sum brustu saman í Klaksvík. Áðrenn dystin var HB liðið sera skert, við tað at fleiri av lyklaleikarunum ikki vóru við, og tað stóð so illa til, at tá dysturin í Klaksvík var bríkslaður í gongd, vóru HB kvinnurnar bert 10 leikarar!

Hesum gjørdu KÍ kvinnurnar sær so avgjørt dælt av, og tá liðini fóru til hálvleiks, var støðan heili 4-0 til KÍ, og tá var alt í roynd og veru avgjørt.

Seinni hálvleikur var eisini eitt stórt álop á HB málið, og tá avtornaði í Klaksvík, var endaliga úrsliti 8-0 til KÍ.

Tann altíð vandamikla Rannvá Andreasen skeyt ikki minni enn fýra mál fríggjadagin, og ein annar stórur leikari í føroyskum kvinnufótbólti, Malena Josephsen, skeyt tvey mál. Síðani skeyt tann eitt sindur meiri verjukendi tvíburði Rannvu Andreassen, Ragna Andreassen, eitt mál, meðan Margit Joensen eisini kom á máltalvuna við einum máli.

Eitt sindur keðiligt fyri dystin og spenningin at HB kvinnurnar av góðum grundum vóru so skerdar, og vit kunnu uttan iva væntа at síggja ein meiri spennandi dyst, næstu ferð hesi bæði liðini møtast. Men tað er spurningurin, um hetta í síðsta enda ikki kann gerast ein sera kostnaðarmikil dystur fyri HB, tí umframt at hava mist trý stig, er hetta sera ringt fyri teirra málúrtøku, um eisini kann koma at vera avgerandi tá avtornar.

Tryggur B36 sigur

Í Havn tók B36 leygardagin ímóti Skála, sum tryggjaði sær luttøku í endaspælinum í síðsta innleiðandi leikumfari við einum sigri á AB. Stríðið lá leingi ímillum Skála og GÍ um triðja plássi í bólki A, og nakað óvæntað vóru tað skálakvinnurnar sum drógu longra stráðið.

Skála var sum sagt í Havn og vitjaði B36, og hesin dysturin endaði ikki serliga óvæntað við einum sigri til B36. Dysturin endaði við einum sannførandi 4-0 sigri til havnarkvinnurnar, hóast tær máttu leika uttan fleiri av vanligu føstu leikarum teirra.

Skála byrjaði væl, og kláraði so nøkunlunda at halda B36 kvinnunum, og hálvleiksstøðan var 1-0 til B36. Men í seinna hálvleiki gekk betri í hond hjá B36, og endaliga úrslitið gjørdist sum sagt 4-0. Sólva Joensen skeyt tvey av málunum hjá B36, meðan Sólgerð Viderø og Maria Vang báðar fingu hvør sítt mál. So B36 fekk endurreisn eftir at tær taptu 4-1 inni í Runavík seinasta vikuskiftið, hóast tann dysturin var týdningarleysur fyri B36.

NSÍ kløkkaði VB

Í Vági tók eitt í løtuni vælleikandi VB lið ímóti einum NSÍ liðið, sum eisini sær út til at vera væl fyri. VB endaði á øðrum plássi í bólki A bert eitt mál aftanfyri HB, hóast tær fingu trý stig móti HB uttan yvirhøvur at spæla dystin, men tær hava leikt væl í ár, og vera uttan iva ringar at syfta.

NSÍ er eisini komi væl við seinastu dystirnir, og tær vunnu sum sagt seinasta vikuskiftið sera óvæntað 4-1 á B36. Hóast hetta var VB liðið ein ov stórur biti hjá NSÍ, og dysturin endaði við einum 4-2 sigri til VB, hóast NSÍ var á odda 2-0.

Hálvleiksstøðan var 2-1 til NSÍ, men síðani gekk alt galið hjá NSÍ í seinna hálvleiki, og VB vann sostatt 4-2.

Tað var ein leikari í Vági leygardagin, sum skaraði framúr, og tað var Guðrun í Lágabø. Leygardagin vísti hon sín týdning fyri liðið við at skjóta øll fýra málini hjá VB. Irdi Hansen kom eisini enn einaferð á máltalvuna við einum brotssparkið, meðan Maibritt Olsen skeyt hitt málið hjá NSÍ.

Sostatt hava KÍ, B36 og VB lagt seg á odda við sigrum í fyrsta dysti í endaumfarinum, meðan HB, Skála og NSÍ ikki fingu nakað stig hetta vikuskiftið, men serliga HB kunnu vit væntа meiri av seinni í ár enn úrsliti í Klaksvík boðar frá. Nú fer kvinnufótbóltur í summarfrið, og byrjað verður aftur at leika 30. juli. Tá vera dystirnir eftir ætlan B36-VB, NSÍ-KÍ og Skála-HB.

Dystirnir hetta vikuskiftið vóru hesir:

KÍ-HB 8-0

KÍ: Rannvá Andreassen 4, Malena Josephsen 2, Ragna Andreassen 1, Margit Joensen 1.

B36-Skála 4-0
B36: Sólvá Joensen 2, Maria Vang 1, Sólgerð Viderø 1.

VB-NSÍ 4-2
VB: Guðrun í Lágabø 4.
NSÍ: Irdi Hansen 1, Maibritt Olsen 1.

Endaliga støðan í bólkaspælinum

Bólkur B

	d	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 HB	10	9	0	1	55	3	52	27
2 VB	10	9	0	1	58	7	51	27
3 Skála	10	5	0	5	17	46	-29	15
4 GÍ	10	4	1	5	26	29	-3	13
5 AB	10	1	2	7	13	52	-39	5
6 Sumba	10	0	1	9	4	36	-32	1

Bólkur B

	d	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 KÍ	8	8	0	0	36	8	28	24
2 B36	8	5	0	3	37	17	20	15
3 NSÍ	8	4	1	3	21	25	-4	13
5 EB/Str.	8	1	1	6	4	29	-25	4
4 B71	8	1	0	7	11	30	-19	3

Støðan, 1. deild kvinnur

	dystir	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 KÍ	1	1	0	0	8	0	8	3
2 B36	1	1	0	0	4	0	4	3
3 VB	1	1	0	0	4	2	2	3
4 NSÍ	1	0	0	1	2	4	-2	0
5 Skála	1	0	0	1	0	4	-4	0
6 HB	1	0	0	1	0	8	-8	0

Máltindurin, 1. deild

Rannvá Andreasen	KÍ	4
Guðrun í Lágabø	VB	4
Sólvá Joensen	B36	2
Malena Josephsen	KÍ	2
Maria Vang	B36	1
Sólgerð Viderø	B36	1
Margit Joensen	KÍ	1
Ragna Andreasen	KÍ	1
Irdi Hansen	NSÍ	1

Bólkaspælið

Halltóra Joensen	VB	21
Annika Godtfred	HB	16
Eyðfríð Christiansen	HB	13
Rannvá Andreasen	KÍ	13
Rakul N. Joensen	B36	10
Malena Josephsen	KÍ	9
Guðrun í Lágabø	VB	9
Heidi Jacobsen	GÍ	8
Irdi Hansen	NSÍ	8
Laila Jespersen	VB	8
Maria Johnson	HB	7
Kristbjørg Isaksen	GÍ	6
Rannvá Augustinusen	VB	6
Elin Kathrina Haraldsen	AB	5
Vivian Thorleifsson	HB	5
Maibritt Olsen	NSÍ	5

adidas

Lesið sosialin sosialin sosialin -tað loysir seg

Alt eftir bókini

EM: Allir fýra favorittarnar vunnu í teimum fýra fjórðingsfinalunum, sum vórðu leiktar um vikuskiftið

Patrick Kluivert ovurfegin eftir fyrsta málið móti Jugoslavia

JÁKUP MØRK

Tað gongur skjótt fram á við at avgreiða EM-endaspælið. Kanska ov skjótt vildi onkur hildið. Tað kennist so stutt síðani alt byrjaði, í hvussu so er hjá teimum, sum við spenningi høvdu sæð fram til størstu europeisku fótbóltshendingina í ár.

Nakað annað er so, at hjá teimum, sum ikki hava hug at nýta vøkru summarkvøldini framman fyri skíggjan, man tað helst kennast sum ein lætti, nú tað bert eru tríggir dystir eftir at avgreiða.

Figo yvir øllum

Fyrsti dysturin leygardagin stóð millum Portugal og Turkaland. Frammanundan var mett, at Turkaland helst var veikasta liðið av teimum átta, sum høvdu vunnið seg úr bólkaspælinum, og tað var í hvussu so er ein sannroynd, at Portugal var betra liðið leygardagin.

Portugisar hava seinasta tíggjuáraskeiðið havt fleiri sera góðar ungdómsárgangir, sum eisini hava vunnið ymisk heiti fyri U-landslið, men aloftast hevur hetta ikki verið nóg mikið, tá talan so gjørdist um kappingar millum A-landslið.

Hetta er nú um at broytast, og ikki minst er hetta Barcelona leikaranum, Louis Figo at takka. Av fleiri serfrøðingum verður hann mettur sum besti leikari í heiminum júst nú, og leygardagin var hann so í øllum førum besti maður á vøllinum.

Einsamallur var hann tó á ongan hátt, tí Portugal hevur eisini fleiri aðrar leikarar, sum so sanniliga eisini hava sínar dygdir, men eingin teirra er í sama flokki sum Barcelona leikarin.

Farvæl til Hagi

Sæð í bakspeglinum var tað eingin ivi um, at Italia var betra liðið, tá teir seinnapartin leygardagin royndu seg móti Rumenia.

Mál frá Totti og Inzaghi, sum framhaldandi hava fult álit frá Zoff, syrgdu fyri italska sigrinum, men tað, sum ein beit mest merki í, var syrgiliga farvælið hjá Hagi, tá hann royndi at spæla sjónleik fyri at ogna sær brotsspark.

Dómurin fyri hetta var gult kort, og tá Hagi frammanundan hevði ognað sær eitt slíkt, var bert ein vegur, út.

Sostatt varð talan um eitt syndarlit farvæl til kanska størsta rumenska leikaran í søguni. Ikki tí, bulmikil er hann ikki, men í sínum skóm nr. 37 hava hansara 167 sentimetrar givið okkum øllum minniligar løtur framman fyri skíggjan, og ikki at gloyma, tá hann á Svangaskarði var við at tryggja rumenskan sigur á okkara útvaldu.

Bert spell, at seinast altjóða kapping hansara við landsliðnum beyð upp á fýra gul kort í teimum trimum dystunum, sum hann fekk loyvi at vera við.

Italska liðið tykist nú vera komið rættuliga fyri seg. Enn hevur spælið ikki nátt teimum stóru hæddunum, men líkt er til, at teir hava megnað at blandað saman gomlu italsku verjudygdirnar við effektivum álopsspæli, og so er spurningurin, hvussu langt hetta røkkur.

Hollendingar ræðandi

Fyri at fara aftur til Italia, so skulu teir so sanniliga gera sítt ítarsta, um tað skal eydnast teimum at steðga hollendsku vertunum.

Her var einki roks av nøkrum slag, tá teir sunnudagin royndu seg móti Jugoslavia. Patrick Kluivert vísti brádliga, hví hann verður mettur sum eitt gott boð til heitið sum besti málskjúttin í EM, tá hann átti seinasta orðið í fýra teimum fyrstu hollendsku málunum.

Seinni eydnaðist tað Overmars at ogna sær tvey mál, áðrenn Savo Milosevic at enda fekk pyntað nakað um úrslitið fyri jugoslavar.

Spanski fótbóltsprinsurin, Raul, gjørdist stóri syndarin, tá hann brendi brotsspark móti Fraklandi

tøku av finaludystinum fyri 16 árum síðani, og eins og ta feðrina, gjørdist talan um ein franskan tvey mála sigur.

Franski fótbóltskongurin, Zidane, legði Frakland á odda, tá hann sendi eitt frískpark upp um spanska verjugarðin og niður nærmasta málhorn, men tað gekk tó ikki long tíð, fyrr enn Mendieta hevði javnað upp á brotsspark.

Djorkaeff legði tó Frakland fram um aftur, og so var at kalla liðugt við málskjótingini.

Fronsku viðhaldsfólkini fingu sær tó ein hvøkk, tá italski dómarin móti endanum av dystinum bríkslaði fyri enn einum brotssparki til Spania.

Mendieta, sum jú hevði skorað frá ellivu metrum fyrr í dystinum, var tá útskiftur, so abyrgdin varð ístaðin løgd á ungu herðarnar hjá spanska fótbóltsprinsinum, Raul.

Ungi framherjin misnýtti tó gylta møguleikan, og ístaðin fyri longda leiktíð,

Portugisiskir áskoðarar fegnast um, at lið teirra nú er í hálvfinaluni fyri fyrstu ferð síðani 1984

Hóast jugoslaviska málið ikki fekk týðning fyri endaliga úrslitið, so forðaði hetta í øllum førum fyri, at Jugoslavia setti met fyri endaspælinum.

Undan hesi kapping, vóru teir nevnliga eitt av tveimum londum, sum høvu roynt at tapt við fimm málum í einum endaspæli (0-5 móti Danmark í 1984), men enn er ongantíð komið fyri, at nakað lið hevur tapt við seks málum í endaspælinum.

Hvussu leikur fer í hálvfinaluni móti Italia, er sjálvandi ilt at gita um. Líkt er tó til, at talan verður um ein dyst millum vandamikla hollendska álopsspælið og trygga italska verjuspælið.

Raul gjørdist syndarin

Seinasta fjórðingsfinalan var millum Spania og Frakland, og hyggjararnir, sum høvdu sett seg til rættist sunnukvøldið, mundu sita trælabundnir allan dystin á tamb.

Talan var um eina endurnoyddust spaniólarnir sostatt vónbrotnir av vøllinum.

Verður spennandi

Hálvfinalurnar standa so fyri framman í kvøld og hóskvøldið, men meðan tað í fjórðingsfinalunum tóktist lætt at gita um vinnaran, tykjast hálvfinalurnar væl javnari.

Flestu vilja helst vera við, at Holland og Frakland er dreymafinalan, men skal hetta verða veruleiki, skulu tey hvør í sínum lagi vinna eina sera torføra hálvfinalu.

Portugal og Italia hava bæði víst sera góðan fótbólt undir endaspælinum, og tey vilja helst gera tað, tey eru ment, til at koma fram til seinasta dystin.

Undir øllum umstøðum er líkt til, at talan verður um tveir sera spennandi dystir tey bæði kvøldini.

Leika og lær

FSF hevur nú givið út bók, sum verður nýtt í samband við fótbóltsskúlarnar, sum í hesum døgum eru kring landið

JÁKUP MØRK

Bóklingurin, sum eitur leika og lær, er fyrst og fremst ætlað fótbóltsskúlunum, men harumframt er einki at ivast í, at venjarar kring alt landið kunnu fáa stóra gleði av henni.

Skal vera spæl

Sum heitið á bókini sigur, so verður við fótbóltsskúlunum lagt upp til, at børnini skulu læra, meðan tey spæla. Tað vil siga, at venjingin skal skipast sum eitt spæl. Heilt í tráð við grundsjónarmiðjunum í fótbóltinum, sum jú í botn og grund er eitt spæl, hóast tað mangan kanska verður tikið fyri meira.

Í bókini verður greitt frá teimum venjingum, sum verða nýttar á skúlanum. Frágreiðingarnar eru stuttar, neyvar og lættskiljandi, og harumframt er til fleiri teirra teknaðar myndir, soleiðis at tilfarið er sera lætt atkomuligt. Eisini hjá teimum, sum ikki fáast so nógv við ástøðiliga partin av venjingini.

Uppbyggingin av tilfarinum er eisini sera einføld, soleiðis at venjingar innan ymsu fótbóltsknstrini verða bólkaðar fyri seg. Hetta er eisini viðvirkandi til, at bæði leikarar og venjarar verða meira tilvitaðir um, júst hví ein ávís venjing verður framd, og hendan tilvitanin átti eisini at bøtt um úrtøkuna úr venjingini.

Til øll

Sum nevnt, er bóklingurin eisini eitt frálíkt arbeiðsamboð hjá øllum teimum, sum fáast við at venja lið í yngru deildum.

Hóast lítil í vavi, kann Leika og lær í mangum førum nýtast sum hugskotsbanki, soleiðis at venjarin altíð hevur onkrar venjingar við hondini, sum kunnu nýtast í eini knappari vending.

Hetta er fyrstu ferð, at alt tilfarið til fótbóltsskúlan er samskipað á føroyskum, og eru tað teir báðir, Jógvan Martin Olsen og Mourits Foldbol, sum hava lagt bóklingin til rættis.

Tekningarnar hevur Regin Debess gjørt.